

*– Javnaðarflokkurin hevur verið tann mest útskeldaði flokkur hetta valskeiðið. TAð er neyvan tí, at javnaðarmenn eru meira forrendir enn aðrir politikarar, men orsøkin er einfalt tann, at okkara mótstøðufólk vita, at vit hava eina góða søk, segði Jóannes Eidesgaard m. a. í røðuni á summarstevnuni*

liggja óloystar og vaksa seg uppaftur størri. Og júst hetta hevur eyðkent sitandi samgongu, har høgra hond sjáldan hevur vitað, hvat hin hondin hevur tikist við. Hetta má broytast, so at ikki alt verður lagt til síðis og kemur í drag. So sum við málunum um Brimil, Teistan, Fólkaskúlan og Læraraskúlan bert fyri at nevna nøkur dømi. At vit fáa eitt landsstýri, sum tekur avgerðir og avgreiðir mál.

Seinastu trý árini hava tó verið merkt av nøkrum slagorðum, taka vit ikki loysingarmálið við. Eitt av hesum hevur verið privatiseringar.

Tað er sera stórt ynski hjá hesi høgravendu samgongu, at alt sum ber til at privatsiera, verður privatiserað. Við Caragata-álitinum leggja teir til brots. Okkara landsjørð, okkara fiskitilfeingið, Føroya Banki, Postverkið, Føroya Tele, Atlantsflog, Strandferðslan, Fiskavirking, Fiskasølan, Framtaksgrunnurin og JFK-trol.

Fólkaflokkurin tí hann trýr upp á liberalismuna, meðan Tjóðveldsiflokkurin tí hann eftirhondini sær, at hetta er kanska einasti møguleiki til at fíggja loysingina. Og tað er tungt at standa ímóti hesum høgrarákið, og serliga tungt, tí vit eru teir einastu, sum eru á varðhaldi.

Tí er tað so týdningarmikið, at vit eru við í hesum orðaskifti, so vit fáa ávirka gongdina. At vit fáa tikið skilagóðar avgerðir, og at vit fáa forða fyri, at tað, sum liggur best hjá okkum øllum, verður latið øðrum, og at eitt nú umsorgararbeiðið fyri einhvønn prís ikki verður privatiserað.

Og hvørjir eru hesir potentiellu keypararnir? Tað er avmarkað, hvussu nógvur vágafúsur kapitalur er í Føroyum, og tí verða nógv av hesum virðum, sum teir ynskja at privatisera, seld útlendingum, og føroyingar gerast húskallar í egnum landi. Vit síggja gongdina longu nú bæði innan fyri alingina og innan fiskivinnuna.

Hví hevur tað slíkan skund at privatiesera bankan? Hvør átti eitt nú bankarnar, tá alt fór á heysin? Tað var ikki skattgjaldarin, men teir privatu, og hví allari víðu verð hevur tað slíkan skund, at hesir sleppa fram til trogið aftur longu nú?

Og gongdin í okkara fiskivinnu, har landsstýrið annanhvønn dag peikar sínar egnu millióningar út, má steðgast. Fyrst vóru fleir av hesum reiðarunum saneraðir fyri hundraðtals milliónir við tykkara pengum, og sleppa síðan nú at sita og selja okkara felags tilfeingið til hægstbjóðandi. Hetta má steðgast ongantíð ov skjótt.

Og hvørjir sluppu framat oljuna? Vóru tað vanligir føroyingar gjøgnum eitt alment oljufelag? Nei, tað vóru teir við pengum á kistubotninum, sum sluppu. Og so siga teir, at teir vilja børsnoterað hesi privatu føroysku feløgini, sum í onkrum førum er næstan bert útlandsk ogn, soleiðis at útlendingar á henda hátt kunnu fáa enn størri ávirkan.

Fólkaflokkurin hevur ongantíð í ævi síni havt so góðar dagar sum seinastu trý árini. Ótarnaðari at reka reindyrkaðan fólkafloks-politikk, meðan tjóðveldismenn hava spælt við fullveldið og loysing. Hetta má alt steðgast, og vit eru teir einastu, sum kunnu steðga hesi gongdini. Men tað gera vit bert, um vit vinna fólksins álit.

Tá hetta er sagt, so er tað eins týdningarmikið, at vit fáa sett ein veruliga politikk út í kortið. At vit fáa eina samgongu, sum veruliga setur sær mál og fremur tey. At vit taka nøkur av teimum ótrúliga nógvum og sera viðkomandi málum fram, sum so eftirtrykkiliga hava ligið í dvala seinastu trý árini. At vit fáa dagligu trupulleikarnar hjá føroyinginum inn aftur í politiska orðaskiftið, sum eitt nú:

- Eina skjóta útbygging av røktartilboðum til eldri og óhjálpin
- Eina skjóta útbygging av tilboðum til sálarliga sjúk
- Styrkja heilsu- og heimarøktina
- Styrkja heilsuverkið
- Eina nýggja pensjónsskipan
- Styrkja rættarsamfelagið
- Tryggja brúkaran í vanliga gerandisdegnum
- Geva okkara fólkaskúla betri arbeiðsumstøður
- Eina endurskoðan av okkara fiskivinnupolitikki, soleiðis at spekulasjónin við fiskidøgum steðgar
- Nýggja raðfesting av íløgunum
- Orða ein útjaðarapolitikk og fáa henda at virka
- Orða ein útoyggjapolitikk og fáa henda at virka
- Seta á stovn arbeiðsmarknaðarútbúgvingar
- Loysa trupulleikan hjá okkara húsvillu landsmonnum
- Mannsømilig viðurskifti aftur millum Føroyar og Danmark
- Fáa ein skilagóðan sjálvstýrispolitikk settan á lunnarnar

Gott fundarfólk og góður eysturoyingar.

Mest útskeldaði flokkur í hesum valskeiðnum hevur verið Føroya Javnaðarflokkur. Tað er neyvan tí, at javnaðarmenn eru meira forrendir enn aðrir politikkarar, men orsøkin er einfalt tann, at okkara mótstøðufólk vita, at vit hava eina góða søk at berjast fyri. Eina søk, sum kann savna føroyska fólkið, og okkara uppgáva fram til valið er tí, at vit fáa boðskapin út.

Latið okkum saman fara undir hesa uppgávu!

Nú ferðast fólk fyri nesini
og sigla inn undir Eið
- ganga so gjøgnum grønan haga
ta longu fundarleið.

Ymiskur er tann húsroykur,
ið hongur uppi við fólk
- og ymisk er gongd og húgvuburður,
har tey tyrpast í bólk.

Og lyndið er dæmt av heimalívi
slíkan dag sum nú
- og innan kot og knappatroyggju
býr ymisk trá og trú.

Mong eru tey í rúgvuni,
sum smæðast seg sjálv og øll,
tí hetta er vaksna manna spæl
ímillum tey høgu fjøll.

Tey standa tí sum í kirkjuni
rundan um talarastól,
smálomb jarma so sunndagsmælt
undir heitari fundarsól.

Men summi hvørva í ungari ást
burtur í grøna lág,
- og summir vekja ella drepa dreym
við at ganga og smakka sær á.

Ein hálvvaksin drongur hentar alt
í huga á sínari leið
- fundarhátíð og lomb og gras
og dreymar við Gøtueið.

Seinni fer hann burtur í lond,
førdur av lagnu og trá
- tá vaknar í onkrari løtu alt,
á Gøtueiði hann sá.



*Jóannes Eidesgaard helt, at søkin hjá Javnaðarflokkinum kann savna fólkið, og tí er tað floksins uppgáva fram til vali at fáa boðskapin út*




# Mála og pussa

Hví mála og pussa, tá ið tú kanst gera bæði í einari arbeisðgongd. Skalsem puss og máling. Eisini havi eg Skalflex máling á goymslu.

Nærri fæst at vita við at ringja til

**Arni Samuelsen**
Tlf. 455775
Klaksvík



# Dagrøktarskipanin Miðvágs kommuna

Søkt verður eftir varaleiðara og einum hjálparfólki til at arbeiða 40 tímars viku, í útibarnagarði í Miðvágs kommunu.

Byrjað verður 06. august 2001.

Umsøkjarar við námsfrøðiligari útbúgving hava fyrimun.

Nærri upplýlsingar fáast við at venda sær til Jónhild Jørgensen, tlf. 332960.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, viðmælum o.a. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 06. juli 2001.

**Dagrøktarskipanin í Miðvágs kommunu**



# Svimjivenjari søkist

Skeggjar søkja venjara til svimjiárið 2001-2002. Svimjiárið byrjar tann 15. august og endar 30. juni.

Løn sambært avtalu.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi seinast 03. august 2001.

Áhugað kunnu venda sær til tlf. 442122.

**Skeggjar**
510 Gøtu



**Nýggjar TANNPROTESUR**

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



Sosialurin Sosialurin Sosialurin -har tað hendir


# Jazzfestivalurin 2001

## Skrá

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***Týsdagur 3. Juli*** | | | Prisur |
| Norðlýsið | 12.00-17.00 | Utferð: Conserto Grotto v/ Pia Dahl - Bo Isholm | kr. 300 |
| Gongugøtan FK | 15.00-16.00 | PWCIM Rock´n Soul Band | ókeyp. |
| Gongugøtan Vaglið | 16.00-17.00 | Jassarnir | ókeyp. |
| Festival Klubbin | 20.00-23.00 | Jens Nørholms Orange Jazz Family | |
| Hotel Vagar | 19.30 | Norðurlensk vísukvøld | |
| ***Mikudagur 4. Juli*** | | | |
| Vesturkirkjan | 11.30-12.15 | Gospel bólkurin PRAISE | ókeyp. |
| Listaskálin | 14.00-15.00 | Broby Klarinett Orkestur | ókeyp. |
| Gongugøtan F.K. | 15.00-16.00 | UNG STJØRNUSKOT | ókeyp. |
| Gongugøtan Vaglið | 16.00-17.00 | L.S.B. Big Band | ókeyp. |
| Hotel Hafnia | 19.30-20.30 | Grapelli Swing Jazz, Hugnatónar í Rest. Hafnia | ókeyp. |
| ***Norðurlandahúsið*** | | | |
| Forhøllin | 19.00-19.30 | Broby Klarinett Orkestur | kr. 150 |
| Konserthøllin | 19.30-21.00 | NHØP & Ole Kock Hansen | do |
| Klingran | 21.00-22.30 | Ulf Fleischer, Kristján Kristjánsson Enqvist/Pensar | do |
| Konserthøllin | 22.30-23.30 | Jens Nørholms Orange Jazz Family | do |
| Festival Klubbin | | Malan Thomsen Band | |
| ***Hósdagur 5. Juli*** | | | |
| Vesturkirkjan | 11.30-12.15 | Ledøje-Smørum Harmoniorkestur | ókeyp. |
| Listaskálin | 14.00-15.00 | Pia Dahl og Bo Isholm | ókeyp. |
| Gongugøtan F.K. | 15.00-16.00 | PWCIM Rock´n Soul Band | ókeyp. |
| Gongugøtan Vaglið | 16.00-17.00 | TEIR v/ Jóannes Reinert | ókeyp. |
| F.K. Pallurin í Hoyvík | 16.30-17.30 | Jassarnir | ókeyp. |
| Hotel Hafnia | 19.30-20.30 | Grapelli Swing Jazz, Hugnatónar í Rest. Hafnia | ókeyp. |
| Á gamla Meiarínum | 20.00-22.00 | SLB Big Band - PWCIM Rock´n Soul Band - TANGZ | kr. 60 |
| Sjónleikarahúsið | 20.00-22.00 | UNG STJØRNUSKOT - Gospel PRAISE | kr. 80 |
| PLATFORM | 21.30-24.00 | Marygold - Clickhaze v/ Eivør Pállsdóttir | kr. 100 |
| Festival Klubbin | | Unn Patursson Band | |
| ***Fríggjadagur 6. Juli*** | | | |
| Listaskálin | 14.00-15.00 | Ledøje-Smørum Harmoniorkestur | ókeyp. |
| Gongugøtan F.K. | 15.00-16.00 | Faroe Teens | ókeyp. |
| Gongugøtan Vaglið | 16.00-17.00 | PWCIM Rock´n Soul Band | ókeyp. |
| F.K. Pallurin í Hoyvík | 16.30-17.30 | UNG STJØRNUSKOT | ókeyp. |
| Festival Klubbin | 17.00-18.30 | Tórshavnar Saxofon Kvartet - Jassarnir | ókeyp. |
| Hotel Hafnia | 19.30-20.30 | Grapelli Swing Jazz, Hugnatónar í Rest. Hafnia | |
| ókeyp. | | | |
| Á gamla Meiarínum | 20.00-22.00 | TEIR - Gunnar Guttesen - | kr. 60 |
| Sjónleikarahúsið | 20.00-22.00 | DEBAZZ - Ulf Fleischer - Kristján Kristjánsson Enqvist/Pensar | kr. 100 |
| PLATFORM | 22.00-24.00 | Hans Ulrik JAZZ-MAMBO | kr. 30 |
| do. | 24.00-04.00 | Opið sum vanligt. Tónleikur: Kim Hansen | kr. 60 |
| Festival Klubbin | 24.00-02.00 | Markku Rinta-Pollari | ókeyp. |
| ***Leygardagur 7.Juli*** | | | |
| Dómkirkjan | 11.30-12.15 | Broby Klarinett Orkestur | ókeyp. |
| Gongugøtan F.K. | 12.30-13.30 | UNG STJØRNUSKOT | ókeyp. |
| Gongugøtan Vaglið | 12.00-14.00 | Tórshavnar Saxofon Kvartet - Broby Klarinett Orkestur | ókeyp. |
| Festival Klubbin | 17.00-18.30 | Pia Dahl og Bo Isholm - Grapelli Swing Jazz | ókeyp. |
| Á gamla Meiarínum | 20.00-22.00 | Unn Patursson Band - Markku Rinta-Pollari | kr. 60 |
| PLATFORM | 22.00-24.00 | Hans Ulirk JAZZ-MAMBO | kr. 30 |
| do. | 24.00-04.00 | Opið sum vanligt. Tónleikur: TANGZ | kr. 80 |
| Festival Klubbin | 24.00-02.00 | DEBAZZ | ókeyp. |
| ***Sunnudagur 8. Juli*** | | | |
| Norðlýsið | 14.00-19.00 | Útferð Conserto Grotto v/ Markku Rinta-Pollari | kr. 300 |


Sosialurin Lesið Sosialin -tað loysir seg!